**Takkarkvøða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum at enda tiltakið við handan av mentanarvirðislønum landsins í Miðnámi í Vestmanna, 18. oktober 2023**

Góðu tit øll

Tað hevur verið mær ein sonn fragd í kvøld, sum landsstýrisfólk í almanna- og mentamálum, at handa virðislønir landsins fyri 2023 til nøkur av fremstu menta- og listafólk landsins.

Hjartaliga tillukku  Teitur Lassen, Birita Mohr, Eilif Samuelsen við væl uppibornu virðislønunum. Og hjartaliga tillukku Ole Wich við sømdargávuni. Hjartans tøkk øll somul fyri tykkara stóra og týðandi íkast á føroyska lista- og mentanarpallinum.

Og tøkk øll tit, sum hava gjørt okkum kvøldið so ógloymandi við flottu framførslunum.

Kvøldið í kvøld hevur sett síni spor í hvønn einstakan av okkum, og í morgin hava vit tað við í førninginum og víðari á lívsleið okkara. Hvørji spor eru sett, og hvat tey hava at týða fyri okkum, er serstakt fyri hvønn einstakan – og tað er tað serstaka við mentan og list.

Hjartans tøkk fyri í kvøld øll somul.

**Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**